VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag
Útnyrðingur, 5 til 10 m/s. Fyri tað mesta skýggjað, við møguleika fyri regni ella ælaveðri av og á. Hitin millum 10 og 12 stig.



Veðrið mikudagin
Framvegis vindur av útnyrðingi, 5 til 10 m/s, sum um náttina minkar nakað. Hálvskýggjað ella skýggjað veður við turrveðri. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið hósdagin
Skiftandi vindur av ymsum ættum, men um náttina mest av eystri. Skýggjað veður, við regni av og á. Hitin millum 10 og 14 stig.

Veðrið fríggjadagin
Landnyrðingur, 3 til 8 m/s, sum um náttina veksur nakað. Skýggjað veður við regni. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið leygardagin
Norðanvindur, 5 til 10 m/s, sum út á dagin minkað nakað. Skýggjað og ælaveður. Hitin millum 9 og 13 stig.

Vóna at Smyril Line ger tað aftur

Altjóða fiskikappingin, sum Smyril Line skipaði fyri hesa vikuna, var so væleydnað,at luttakararnir vóna, at hon verður aftur næsta ár

FISKIKAPPING
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Luttakararnir vóru allir glaðir og vónaðu, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak.
Tað er niðurstøðan hjá Kunningarstovuni í Runavík, nú havfiskikappingin "Smyril Line International Sea Angling Cup" er liðug.
À samkomu hóskvøldið í Runavík vóru vinnararnir heiðraðir og steyp og virðisløn vórðu handað.
Tilsamans vórði ikki færri enn sjey steyp og virðisløn at kappast um.
Í kappingini hjá unglingum, var bara ein luttakari, so tað var ikki tann stóri spenningurin um úrslitið: Tað var tann 15 ára gamli hetlendingurin, Mark Laurenson, sum vann.
Men fyrireikararnir siga, at hann var ein virðiligur vinnari, tí samanlagt endaði hann á 12. plássi við 496,8 stigum.
Vinningurin hjá honum var útgerð og peningur fyri 1000 evrur frá Jógvan Weihe – tað er einar 7.500 krónur.
Men hetlendski drongurin fekk eisini eina aðra virðisløn.
Fyritøkan Mustad hevði latið ein serligan vinning til hesa kappingina, Hendan virðisløn nevndist "the Mustad Silver hook trophy" og verður einans latin til heilt serligar kappingar. Hendan vinningin vann Mark Laurenson eisini fyri sítt flotta avrik.
Geir Sivertzen frá Mustad segði, at Mark hevur víst stórt ídni, og heldur hann fram at fiska, hevur hann alt, sum skal til fyri at gerðast ein av fremstu havfiskarunum.
Og hann tosar av royndum, tí liðið hjá honum "Team Mustad" vunnu liðkappingina greidliga. Við heili 2421,8 stigum vunnu Geir Sivertzen, Tore Gismervik, Jan Ring og Torunn Handeland liðkappingina og tær 2000 Evrurnar, sum fylgdu við. Nummar tvey var skotska liðið við 1970,7 stigum.
Tað vóru eisini fimm kvinnur við í kappingini og tær megnaðu at geva monnunum ein skarpan gang. Men táið avtornaði, var tað ikki óvæntað, at norska Torunn Handeland fór við fyrstaplássinum og teimum 1000 Evrunum, sum fylgdu við. Hon endaði við at fáa 502,18 stig og tað verður mett at vera eitt megnar avrik.
Men tað var eisini ein virðisløn til besta, føroyska skiparan. Og kappingin hjá skiparunum var hørð.Allir royndu at gera sítt besta, tí teir fingu fleiri stig, jú betri úrslit fiskararnir á teirra báti fingu. Ferðaráð Føroya stuðlaði vinninginum hjá besta skiparinum. Vinningurin var 2000 Evrur og tað var skiparin á Billu Star, sum vann.
Ein vinningur var eisini fyri tann størsta fiskin og har var eisini stórur spenningur, tí vinningurin var heilar 10.000 Evrur, ið eru einar 75.000 krónur.
Tað var stjórin í Smyril Line, Thomas Magnussen, sum avdúkaði vinnaran og tað varð Tore Gismervik, sum fekk eina longu, ið vigaði 7,5 kilo. Hesin sami Tora Gismervik var eisini á vinnandi liðnum, so hann hevði eina góða kapping.
Men størsti spenniingurin var kortini, tá ið Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, kunngjørdi, hvør hevði fingið flest stig tilsamans allar tríggjar dagarnar og og sostatt vann heiðurin og tær 75.000 krónurnar, sum fylgdu við fyrstu virðisløn.
Kappingin var sera hørð ímillum teir fremstu, tí einans 13 stig vóru á muni ímillum nummar 1 og 2. men tað gjørdist Roy Robertson úr Skotlandi, sum dróg longra stráið við sínum 725,10 stigum.
Annars sigur kunningarstovan í Runavík, at borðhaldið var sera hugnaligt. Brandur Enni setti ein serligan dám á við síni vøkru rødd og limir í Dansifelagið úr Eysturoy greiddi útlendsku luttakarunum frá um føroyska dansin, og omaná fingu øll høvi at royna seg á gólvi.
Dansurin rungaði í høll og luttakarnir vóru allir glaðir og vónaðu at hetta fór at verða ein afturvendandi kapping.
- Smyril Line International Sea Angling Cup hevur við hesi kapping megnað at víst útlendingum á, at havfisking eisini er nakað, ið føroyska ferðavinnan kann bjóða, sigur kunningarstovan í Runavík.

Tá ið steypini vórðu handað á fiskikappingini hjá Smyril Line, fekk 15 ára gamli hetlendingurin, Mark Laurensen tað skoðsmál, at hann hevur alt, sum skal til at gera ein sonn fiskiklógv. Hann fekk eisini heiðursløn

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	5
Qaqortoq	8
Ammassalik	5
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	11
Lerwick	14
Aberdeen	15
London	--
Tromsø	--
Bergen	16
Oslo	--
Stokkhólm	21
Keypmannah.	17
Helsinki	18
Moskva	21
Berlin	18
Warzawa	20
Kiev	20
Bukarest	23
Paris	19
Madrid	29
Róm	24
Malorca	27
Athen	29
Malta	28
Tunis	31
Beijing	32
New Dehli	32
Bangkok	31
Jakarta	32
Sydney	17
New York	20
Miami	30
Los Angeles	23
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	14

LUFTTRÝSTIÐ



Veðurvánirnar til mikumorgunin
Eitt lágtrýst, 990 hPa yvir útsynningspartin av Noregi flytir seg spakuliga í ein útnyrðing, og eitt tilhoyrandi brúgvalag nærkast spakuliga Føroyum.



Norðanvindur, sum seinni snarar í ein útnyrðing. Í kvøld veksur hann vindin upp í 13 m/s. Tað verður skýggjað og í fyrstuni turrveður, við toku í støðum. Í kvøld fer at regna. Hitin millum 10 og 13 stig.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 27/8 kl. 06^{00}– 28/8. 06^{00}. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í august: 0,2° - Mesti hiti máldur í august: 22,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,9 mm – mált frá 27/8 kl. 06^{00}– 28/8 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í august: 41,2 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

www.sosialurin.fo

GEVID BLÓÐ

VESTFALLSKYRRINDI

26. august Mánin longst frá jørðini

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
29. Aug	11.02	23.20	10.02	22.20	10.17	22.35	00.44	13.02	01.44	14.02	09.17	21.35	08.17	20.35	11.17	23.35	-	12.17	10.47	23.05	-	12.02
30. Aug	11.40	-	10.40	23.01	10.55	23.16	01.20	13.40	02.20	14.40	09.55	22.16	08.55	21.16	11.55	-	00.35	12.55	11.25	23.46	00.20	12.40
31. Aug	00.01	12.37	11.37	-	11.52	-	02.01	14.37	03.01	15.37	10.52	23.29	09.52	22.29	00.16	12.52	01.16	13.52	-	12.22	01.01	13.37
1. Sept.	01.14	13.54	00.14	12.54	00.29	13.09	03.14	15.54	04.14	16.54	-	12.09	11.09	23.49	01.29	14.09	02.29	15.09	00.59	13.39	02.14	14.54
2. Sept	02.34	15.00	01.34	14.00	01.49	14.15	04.34	17.00	05.34	18.00	00.49	13.15	-	12.15	02.49	15.15	03.49	16.15	02.19	14.45	03.34	16.00

Kelda: Ámanakkin 2006

5 707265 100036 >